


# Mærsk skal selja Esvagt

Jan Müller

26.03.2014 - 09:14

Oljan.fo

A.P. Møller-Mærsk er komið væl ávegis við ætlanum um at selja reiðaríið Esvagt, sum hevur heimstað í Esbjerg, haðani tað rekur fleiri frálandaskip. Tað skrivar Børsen í dag.

Til fyri stuttum var Esvagt partur av Mærsk-deildini Shipping & Other Services, men so bleiv felagið lagt undir deildina Operated Investments Portfolio, sum verður brúkt til at selja dóttirfeløg.

Keldur hjá Børsen meta, at Esvagt kann seljast fyri millum tvær og tríggjar milliardir krónur, og tað ljóðar, at Mærsk-leiðslan longu í heyst bað nakrar bankar um hjálp til at selja felagið.

Enn er tó eingin søluavtala gjørd, og sambært Børsen kemst tað av, at minnilutaeigararnir í Esvagt vilja tryggja sær, at felagið verður verandi á donskum hondum. A.P. Møller-Mærsk eigur tríggjar fjórðingar av partapeninginum í Esvagt.

Nógvir føroyingar sigla við skipum hjá Esvagt, sum eisini eigur dóttirfelagið Esvagt Thor saman við føroyska felagnum Thor.